fóðindabloðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: **Jan Müller**
Fyritaksstjóri: **Krisjan Dahl**
Ljósmyndari: **Kalmar Lindenskov**

Blaðfólk: **Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Justinus L. Eldesgaard - Eyðun Klakkstein - Elrikur Lindenskov - Áki Bertholdsen**

Útgevari, uppsetning og prent: **Sp/f Sosialurin**
Bústaður: **Argjavegi 26 Argjum**

Postadr. **Postsmoga 78 110 Tórshavn**
Telefon: **11820**
Telefax: **14720**

Internet: **http://WWW.cybernet.dk/faroe-news** e-mail: **sosialur@olivant.fo**

Fuglafjarðarætlanin

Oddagrein

HERFYRI kunngjørdi bygdarráðsformaðurin í Fuglafirði eina sera spennandi og áhugaverda ætlan. Hon snýr seg um at gera Fuglafjørð til tilfeingisdepil fyri pelagiskan fisk.

PLÁSSIÐ hevur drúgvar royndir sum fiskivinnubygd og er einasta stað í Føroyum, sum tekur ímóti pelagiskum fiskasløgum. Hyggja vit kring okkum liggur Fuglafjørður sera væl fyri sum miðdepil í Norðuratlantshavi fyri mótttøku av pelagiskum fiskasløgum.

NÚ eru tað góðar kreftir á plássinum, sum hava tikið seg saman og vilja koma viðari. Tær vilja byggja viðari á áralangar royndir og harvið menna ein part av fiskivinnuni her á landi. Verkætlan er gjørd, sum snýr seg um at byggja út frystigoymslurnar, soleiðis at tað ber til at taka ímóti stórum nøgdum av fiski. Ætlanin er eisini at betra um havnaumstøður nar, soleiðis at størri og fleiri skip kunnu landa í senn umfr amt tey skip, sum taka ímóti lidnu vør unum fyri at skipa tær viðari. Haraftrat fevnir ætlanin eisini um at útb yggja møguleikarnar at arbeiða pelagiska fiskin til matvør u.

SAMANUMTIKIÐ ein ser a spennandi ætlan, sum vónandi hevur áhuga hjá øðr um enn teimum á plássinum. Tí hóast talan er um at byggja út vinnumøguleikar nar á einum ávísum plássi, er her so sanniliga eisini talan um at menna fiskivinnuna sum heild. E in útbygging á staðnum er at meta sum ein skilagóð samfelagsútbygging. Tí avkastið frá øktum vir ksemi her fer at koma øllum samfelagnum til góðar.

NÚ tá tað verður tosað um, at v anligu botnfiskastovnarnir eru niðurfiskaðir ella ov hart troyttir eru allar ætlanir um at troyta aðrar fiskastovnar kærkomnar. Júst tí er Fuglafjarðarætlanin eitt einastandandi høvi til at royna aðrar leiðir. Lodna, makrelur, sild og svartkjaftur eru nøkur av fiskasløgunum, sum talan er um, og hetta eru fiskasløg, sum nógv er til av.

VIT eiga flotan til at veiða hesi fiskasløg. Vit eiga mjølverksmiðjuna í Fuglafirði. Vit hava longu umstøður at arbeiða fiskin til matna og vit hav a bæði atløgupláss og goymslur. Men her er eitt stórt men. Skal nøkur framtíð verða í at fáa meira burtur úr hesum fiskasløgum, mugu fløgur ger ast í sum longu nevnt goymslur, virki og havnalag. Av tí at talan er um eina útb ygging í Fuglafirði aleina er tað helst onkur politikar i, sum heldur, at tað tá má v era ein uppgáva fyri plássið har at útvega pengarnar. Hertil er at siga, at hetta er ikki bert ein økisuppgáva men eisini ein samfelagsuppgáva, og eigur tað almenna at v era við í hesi ætlan so ella so. Undir øllum umstøðum eiga pengar at v erða settir av til betran av havnaviðurskiftunum, og eisini átti almennur peningur at v erið við til at útbygt frystigoymslurnar, sum í síðsta enda kunnu koma allar i fiskivinnu til góðar.

TAÐ er sjálvandi best, um eitt slíkt pr ojekt kann verða sjálvfiggjað tvs. við privatum kapitali og við hjálp frá kommununi. Men í førum har talan er um at ger a eina fløgu, sum røkkur so langt sum henda og har hon fevnir um at troyta so stórar nøgdir av fiski talan her er um, átti hetta eisini at v erið ein samfelagsuppgáv a. Málið liggur í landsstýrinum og tað er at vóna, at tað fær ikki bert góða men eisini skjóta viðgerð.

JÚST hetta at kunna virk a fiskin til matna heldur enn til mjøl er av ómetaliga stór um týningi. Men at hava báðar møguleikar tøkar er ein týðandi par tur av verkætlanini, tí tað er ikki altið tú kanst brúka fiskin til matna. Høvuðsdentur in eigur at verða lagdur á matvøruframleiðsluna, og eigur mjølfr amleiðslan tí at koma í aðr u rað.

TAÐ kann so eisini hugsast, at so nógvur fiskur kemur uppá land, at hann kann flytast til onnur vir ki í landinum at verða virkaður til matna. Slíkt ger ætlanina enn meira áhugaverda, og tí eiga eisini politikar ar og vinnulívsfólk uttan fyri Fuglafjørð at vísa verkætlanini ans.

Sosialurin

Miðflokkurin og 2. boð

Viðmerking



Dan Petersen skrivar

»Tú mást ikki misbrúka navn Harrans, Guðs tíns, tí at Harrin sigur ikki tann ósekan, ið misbrúkar navn hans«.

Onnur Mosubók 20. kap. vers 7

Ikki uttan spenning hugdi eg í tað nýggja blaðið hjá Miðflokkinum, Miðblaðið, kallað. Tann flokkurin hevur jú verið lagdur undir at gjara út við kristindómi fyri at fáa politiskt vald. Summi meta hetta sum hykl, onnur meta tað at vera ótespiligt. Og ótespiligt er tað.

Í Miðblaðnum hjá Miðflokkinum eitur ein grein **»Maðurin í miðjuni«**. Skal nokk eitast at vera eitt andagtsstykki. Fyrst er ein skrøna um 3 bilførarar, ið søkja sama starv. Tveir koyra ytst úti á kantinum, meðan tann triðji liggur so nær **miðjuni** sum gjørligt. Tann **á miðjuni** fær sjálvandi starvið. Síðan kemur eitt skriftstað har vit hoyra, at Jesus hekk **í miðjuni.** So koma nakrar hugleiðingar, har vit aftur fáa at vita, at tað altso var **í miðjuni**, Jesus hekk. Viðari hoyra vit, at við at Jesus hekk **í miðjuni**, vildi Guð vísa, at Kristus var **í miðjuni** á heimsøguni, og at Kristus ynskir at vera **miðdepil** í tínum lívi. Og til seinast verður spurt, um tú hevur sett Kristus **í miðjuna** á tínum lívi. Tað mest ónossliga er, at umframt yvirskriftina eru **»í miðjuna«** og **»miðdepil«** allar 6 ferðirnar skrivaðar við feitari svartari skrift.

Soleiðis kann tað gerast. Fý for ólukkan!!! Ivast nakar, so blaðið upp á síðu 15 í Sosialinum fyri mikudagin 16. oktober - um tit troysta tykkum.

Dan Petersen

Lesarabrøv

Aftursvar til Ninu Dahl

Í brævi tínum í Sosialinum fær ein ta fatan, at vandin er serliga stórur fyri, at børn verða heilaskadd tá tey verða fødd í Føroyum.

Hetta hava vit onga vitan um og ei heldur illgruna um.

Í hinum svarinum til tín gjørdi eg vart við, at tann sokallaða perinatala deyðiligheitin, tað er talið av deyðføddum og deyðum í fyrstu viku, er høg í Føroyum. Teir tríggir læknarnir Sjúrður Olsen, Steintóra Samuelsen og Høgni Debes Joensen almannakunngjørdu í British Journal of Abstetric and Gynaecology í mai 1995 grein um hetta. Teirra niðurstøða var, at ikki bar til í tíðarskeiðinum 1977-86 at finna eina ávísa grund til yvirdeyðiligheitina í Føroyum samanborið við Ísland.

Tað, sum vit í heilsuverkinum kunnu gera, er at tryggja okkum at tænasturnar, til kvinnur sum eru við barn, tænasturnar umkring føðingina og beint aftanå, eru á rímuligum støði.

Tær leiðbeiningar, sum danska heilsustyrið gevur dønum viðvíkjandi barnsburði, kundu vit í dag eisini fylgja í Føroyum. Tað ber til at fara til kvalifiseraðar kommunulæknar og jarðamøður í tann mun, tað er tørvur á tí. Tað stendur øllum kvinnum sum eru við barn í boði at koma til serlækna í kvinnusjúkum í 18. viku og um neyðugt oftari. Síðst og ikki minst ber tað til at eiga á sjúkrahúsi við serkunnleika í døgnvakt. Jarðamóðurin kann tilkalla kvinnulækna og narkosulækna tá tað tørvar.

Tú nevnir, at tørvur er á kanningum viðvíkjandi lungasjúkum hjá nýføddum. Tað er rætt, at hjá summum nýføddum - og serliga ov týðliga føddum - kann lungabúningin vera ein álvarsligur trupulleiki, men eg eri ikki vitandi um, at hetta er eitt serstakt føroyskt fyribrygdi.

Vinarliga

Pál Weihe, læknastjóri

URTAGARÐSARBEIÐI & ANNAÐ

Summarið er farið, so nú er tíðin komin at klippa runnar og trø, rudda í havanum og uttanum húsini.



Er ætlanin at gera hava til summarið 97, ella gera nakað við túnið, t.d. leggja oljugrús ella flísar á tað, so er tíðin NÚ

SÍMUN DALSGAARD
Anl. gartnari · Hoyvík
15478
Best í dag.tímanum ella e. kl. 18.

VIKING LOTTO
viku nr. 42, 16.10.96

Vinnaratøl: **5 - 7 - 18 - 25 - 34 - 47**
Eykatøl: **11 - 19 - 45**
Prognosa:

6 vinnaratøl	4.038.875 kr.
5 vinnaratøl + 1 eykatal	78.767,- kr.
5 vinnaratøl	7.177,- kr.
4 vinnaratøl	171,- kr.
3 v.tøl + minst 1 eykatal	55,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

TELDU-DREYMAR?
Ger OLIVETTI KVETTI! Nýggja røðin eitur XANA og er skapt til tín....
53-XXX
yes!! yes!! yes!! yes!! yes!!
GRAFIKKSTOVAN RÁ 17477
Fæst úr lisa kr. 12.500 v/MVG
Pentium 120, 1 Gb harðdisk, 8 MB RAM, 8xCD-ROM, Hátalarar, ljóðkort, mikrofon, Wind. 95.- + orgrynna av spolum og forritum
COM-DATA PF
TÓRSHAVN, Tlf 16173
KLAKSVÍK, Tlf 56173
GLYVRAR, Tlf 49840